## Royn vil leggja saman



Hvalbingar fara nú at tosa við onnur fótbóltsfeløg í Suðuroynni um at leggja saman. Tað varð samtykt á aðalfundi í Royn leygarkvøldið. Á aðalfundinum varð spurningurin viðgjørdur, um Royn skuldi kanna møguleikarnar fyri at leggja 2. deildarliðið hjá felagnum saman við einum øðrum felag í Suðuroy. Hugsað varð fyrst um at leggja saman við grannunum, TB av Tvøroyri.

Aðalfundurin gav nevndini í Royn heimild til at tosa við nevndina í TB um samanlegging og um, hvørjar treytirnar fyri samanleggingini vildi verið. Men nevnt varð eisini, at setti TB órímiligar treytir, kundi møguleikin kannast hjá hinum felagnum í Suðuroy, VB, sum frammanundan hevur lagt saman við Sumba um fótbóltin í teimum vaksnu deildunum. Tá ið nevndin hevur kannað teir møguleikar, sum eru, skal málið aftur leggjast fyri ein aðalfund, ella ein eykaaðalfund til endaliga støðutakan. Á aðalfundinum varð nevnt, at skal fótbólturin mennast aftur, er einasta gongda leið at feløgini í Suðuroy samstarva fyri at fáa mest burtur úr tí tilfeingi, sum er til taks, bæði av leikarum og pengum.

### Fóru eftir øllum

Gøtumenn vóru á Svangaskarði fyri at vinna øll stigini, soleiðis sum teir so ofta áður hava gjørt.

–Vit pressaðu teir, og fyrstu løtuna gekk tað væl, og vit komu framum. So fingu teir takið, og tá ið teir javnaðu, hevði B68 mál leingi ligið í luftini. Vit áttu síðstu løtuna, og tá áttu vit at havt avgjørt, men vit høvdu ikki marginalirnar við okkum, staðfestir Hanus Jacobsen, sum kortini heldur, at eitt stig á Toftum er at liva við.

– Eftir dystargongdini kunnu vit vera nøgdir. Men tað er ikki nóg gott, at vit ikki megna at spæla okkum til trý stig á heimavølli móti GÍ, heldur B68 miðverjin Ovi Magnussen.

### Ein inni og ein úti

Tað eydnaðist B68 at fáa pappírsarbeiðið liðugt fríggjadagin, so hollendski miðvallarin, Ralph van Dooren, kundi spæla við móti GÍ sunnudagin. Tað eydnaðist ikki GÍ undan vikuskiftinum at fáa pappírsarbeiðið frá hondini, so Gunnar Nielsen, sum í fjør var í Fuglafirði, kundi spæla við móti B68.

### Áttandi javnleikurin

Sunnudagin spældu B68 og GÍ 25. landskappingardystin í fremstu deildini á Svangaskarði, síðani tey hittust fyrstu ferð í 1981. Javnleikurin var tann áttandi, og hetta var fimta ferðin, at úrslitið var 1-1. Hinar ferðirnar hava verið í 1981, 1985, 1995 og 2002.

Tølini siga, at GÍ ofta hevur staðið seg væl á Svangaskarði. GÍ hevur vunnið trettan ferðir, og B68 hevur vunnið fýra ferðir. Samlaði málmunurin er 29-56!

B68-GÍ 1-1 (0-1)

# Veteranarnir settu dagsskránna

*B68*

*GÍ*

**Eitt stig í part tóktist at vera at liva við hjá báðum pørtum eftir oyggjauppgerðina á Svangaskarði, har ungu menninir fingu góðan stuðul frá teimum royndu**



*B68 og GÍ fingu eitt mál í part í uppgerðini á Svangaskarði sunnudagin*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**B68-GÍ**
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*

Tað ræður um at geva ungum monnum, sum eru uppvaksnir í felagnum, møguleikan. Tað er einasta gongda leið, um teir skulu mennast og gerast stuðlar og berandi kreftir á liðnum. Hetta er hugburðurin bæði á Toftum og í Gøtu, og fatanin er bæði røtt og rímulig.

Tá ið feløgini, sum seinastu stívliga fjórðings øldina hava verið tey fremstu í Eysturoy, hittust á Svangaskarði, vóru nógvir ungir og evnaríkir spælarar á báðum liðunum. Dystargongdin vísti eisini, at tað er ógvuliga týdningarmikið at hava royndar spælarar at hjálpa teimum yngru.

Á B68 liðnum vóru Arnbjørn Danielsen í miðverjuni og serliga Øssur Hansen á miðvøllinum eyðsýndir. Ein annar veteranur, Súni Fríði Barbá, var fremsta álopshóttanin, og hann skoraði einsamalla B68 málið. Tað gjørdi hann, tá ið seinna umfarið var meiri enn hálvrunnið, og eftir at B68 í fitta løtu hevði verið omaná og eisini hevði havt møguleikar fyri at javna.

B68 málið kom eftir best gjøgnum spælda álopið hjá teimum. Teir nýttu bæði breidd og dýpd, áðrenn innskifti Jóhan Dávur Højgaard stakk bóltin fram eftir miðásinum og til Súna Fríða Barbá, sum var á rangstøðumarkinum. Súni Fríði var púra kaldur, sneiddi framvið fína GÍ málverjanum og trillaði bóltin í málið.

So var javnt. Men tað var ikki heimaliðið, sum síðstu løtuna átti bestu møguleikarnar at fáa sigursmálið. Teir átti GÍ. Í vinstra borði tóktist B68 ikki sannførandi í verjupartinum. GÍ hevði fleiri góð álop, og í tí eina førinum høvdu teir tríggjar royndir móti málinum hjá óføra Tóra Thomsen. Hans Jørgen Djurhuus sendi í stólpan, málverjin hálvbjargaði roynd ini hjá Sámali Joensen, og Jann Ingi Petersen bjargaði á strikuni, tá ið Hanus Jacobsen royndi seg!

### Veteranarnir gingu undan

Eisini undan steðginum var GÍ eitt sindur omaná. Leikferðin var ongantíð so høg, sum hon viðhvørt er at síggja. Í løtum hekk samanspælið hampuliga væl saman, men tað kom meiri enn so fyri, at tað varð sparkað høgt og langt í góðu líkindunum.

Á GÍ liðnum vóru tað í 1. hálvleiki serliga veteranarnir Sámal Joensen og Pól Ennigarð, sum fyltu nógv á miðvøllinum. Pól var í meiri verjukendum leikluti, og Sámal var framrættaður og dugdi, sum hann plagar at gera, væl at finna holini frammarlaga á vøllinum.

Serliga síðstu løtuna undan steðginum var Sámal rættuliga vandamikil. Nýggi B68 maðurin, Ralph van Dooren, var verjukendur miðvallari. Hann tykist hava góð evni við bóltinum og góða fatan av spælinum, men hann er ikki í nóg góðari venjing, og síðstu løtuna undan steðginum var heilt galið.

Sámal Joensen hevði onkrar góðar roynd ir, og tað var hann, sum setti hol á í 20 minutti. GÍ vann bóltin av B68, sum misti á veg í álop í vinstru. Bólturin varð spældur út í høgra borð til Pól Ennigarð, sum smeig sær til baklinjuna og legði flatt og skrátt innfyri. Eftir kontra datt bólturin fyri føturnar á Sámali Joensen og so var 1-0. Afturat Sámali hevði Hanus Jacobsen eisini onkra vandamikla roynd, men tað komu ikki fleiri mál.

Hjá GÍ vóru Kaj Ennigarð og Niclas Niclassen fyri tað mesta tryggir miðverjar. Onkra ferðina var um reppið, at Súni Fríði Barbá varð leysur. Arbeiðssami B68 framherjin var tó ov einsamallur. At hava Jann Inga Petersen sum álopsrættaðan miðvallara tykist ikki sannførandi hugskot. Dygdirnar hjá honum eru meiri at varðveita og spjaða spælið heldur enn at detta í holini frammi á vøllinum, bjóða av í gjøgnumbrotum og at hótta við skotum úti frá.

Felags fyri ungu menninar á báðum liðunum tykist vera, at teir hava góð evni, og at teir fara at fáta sær. Men hesa ferð vóru tað veteranarnir, sum stóðu sterkast í myndini.